

**Kári á Rógvi**
*løgtingsmaður og formaður Sjálvstýrisfloksins*

# Løgmaður lagdur á ís

Seinastu vikurnar er nógv hent í føroyskum stjórnmálum. Løgtingið er vorðið veruliga umboðandi og tekur støður ið avspegla fólksins fatan. Vit hava staðið í stað á mongum økjum, tí alt ov nógvir ókonstruktivir minniluturar hava havt sýtingarrætt og hava noktað fyri uppskotum uttan at vísa aðrar loysnir. Kendasta ímyndin av hesum hevur verið lógin ið bannar 8% øli, men loyvir 13% víni og krevur, at farið verður yvir um hav við vatni. Hetta forboðið hevði nakrar halt fáar stuðlar á tingi, sum altíð megnaðu at leggja veto, líkamikið hvør samgongan var. Nú ongin stjórn situr, bar til hjá tinginum at taka somu støðu sum fólkið.

Men nógv størri týdning hava so mong onnur øki. Lestrarpláss, kommunubygnaður, realkredittur og onnur alternativ fígging bæði fyri sethús og vinnu, samfelagsbúskaparliga burðardygg fiskivinna, umskipan av skatti frá inntøku til dálking og tilfeingi, eins og aðrar avbjóðingar, tær krevja allar loysnir, har vit somuleiðis seta til viks ókonstruktivar minnilutar uttan egnar loysnir.

Men tí vit hava staðið í stað so leingi, so krevjast rættiliga nógvar samtyktir, ov nógvar til at nøkur 17-mannasamgonga megnar tær. Meirilutarnir eru 'uppá kross.' Sjálvur samtykti eg til dømis at menna rættarskipanina saman við einum meiriluta, men at kanna fátækramarkið saman við einum øðrum, og at skriva føroyingar í manntal við einum triðja.

Tí er best at vit eisini fáa minnilutastjórn eftir valið, so teir ymsu meirilutarnir fáa virka í senn. Men lat meg líka rætta hatta síðsta. Vit mugu fáa minnilutastjórn í Føroyum; í løtuni hava vit onga stjórn! Ongin tekur stig til samráðingar, ongin spælir út, ongin heldur saman um heildina. Tí meðan alt hetta hendir er løgmaður í Grønlandi. Hann hevur hitt Hillary, fer helst at boðað frá, at hann hevur boðið henni til Føroya. Við bløðini har burturi sigur hann, at føroyingar óttast at golfstreymurin skal venda. Fólk mugu spyrja: hava vit nakran stjórnarleiðara í Føroyum ella bert ein regent ella forseta, sum flýtur omaná, meðan vit onnur mugu stýra skútuni við áralagnum, tí stýrisvølurin er sleptur?

Hygg at málinum um grannskoðararnar. Málið er bert toppurin av ísfjallinum av tí rotinskapi, sum Fólkaflokkurin hevur staðið fyri við landsstýrismonnum, sum 'levara' vinningsbýti til sínar partaeigarar. Rætta mannagongd var, at løgmaður setti í verk størri kanning av hesum mynstrinum – umframt at reisa ákæru móti landsstýrismonnunum og at suspendera og kanna aðalstjórarnar í júst tí ítøkiliga málinum. Men løgmaður noktaði at brúka heimildir sínar – løgmaður tveitti við ósannførandi grundgeving málið í tingið, har mannagongdirnar eru truplari, men kortini hava vit baksast við hesum málum, uttan at tann ið hevur heimildirnar einsamallur hevur rætt hond frá síðu. Táið eitt blað (sum bert við greiðari tilvísing sýnir liberalu sambandshugsjón sína) ferð eftir ferð skrivar: "Gott løgmaður" um okkara svar uppá Mr. Chance, er talan um enn eitt non-paper ið rósar sitandi non-stjórn.

Sjálvstýrisflokkurin bjóðaði rest-BC sama sleip sum vit buðu CHE í síni tíð. Áheitan okkara á løgmann sæst á heimasíðu okkara. Vit vildu hava samtykt nøktandi lestrarpláss eftir 5 árum, vildu hava staðfest skylduna at spara upp til eftirløn, vildu seta rættarskipanarnevnd, leggja saman aðalfráðini frá 9 til 5-7, vildu seta politiskt óheftan landsstýrismann at greiða makrelmálið og loksins hava løgmann at brúka heimildir sínar at taka neyðug stig í grannskoðanarmálinum. Løgmaður hevur ikki gingið okkum á møti í nøkrum av hesum og hevur ikki boðið okkum til aðrar samráðingar enn tær ónøktandi makrelsamráðingarna.

Løgmaður hevur lagt seg sjálvan og landsins stjórn á ís.



**Elin N. W. Tausen**
*skrivari*
*Vegna nevndina í Føroya Pedagogfelag*

# Er politiskur áhugi fyri trivnaðinum á dagstovnaøkinum?

Trivnaðarkanningin, "Starvsfólk á dagstovnum", sum Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning gjørdi fyri Føroya Pedagogfelag í 2010, vísir, at 61 % av starvsfólkum á dagstovnaøkinum halda, at arbeiði teirra í minni mun ella als ikki verður virðismett av politisku myndugleikunum. So kann man undrast yvir, hví so er. Men í veruleikanum er tað ikki nakað undarligt í hesum, tí politiski áhugin fyri hesum øki, kann sigast at vera = 0!

Dagstovnaøkið er eitt stórt umráði við eini 1100 starvsfólkum, bæði pedagogum og hjálparfólkum. Eini 5200 børn eru í aldursbólkinum 0 til 7 ár, sum dagstovnaøkið fevnir um.

Raðfestingin á hesum stóra øki sæst aftur við at tað bara starvast ein fulltrúi við at umsita hetta økið, og hesin sami fulltrúi starvast á skúladeildini. Nú er fulltrúin sett niður í hálva tíð.

Eftir at forkvinnan í Føroya Pedagogfelag hevur skrivað eitt opið bræv til Landsstýriskvinnuna í mentamálum, er Landsstýriskvinnan komin fram við nøkrum ætlanum fyri økið, og tað er at fegnast um. Men samstundis viðgongur Landsstýriskvinnan tað, sum starvsfólk á økinum væl vita, nemliga, at dagstovnaøkið er eitt niðurprioterað øki vegna vantandi orku og øðrum raðfestingum í MMR.

Dagstovnaøkið er eitt øki, sum kommunurnar hava yvirtikið, og sum tær umsita fíggjarliga, og tað sær út til, at tær als ongar politiskar visjónir hava hesum viðvíkjandi – annað, enn at spara pening. Kommunurnar síggja dagstovnaøkið sum eina tænastu veiting til foreldur, heldur enn at síggja tað sum eitt mennandi og avbjóðandi tilboð til teir 0 til 7 ára gomlu borgararnar. Fokus er á at hava góðar og flottar bygningar, men tá ið tað kemur til sjálvt innihaldið, so eru umstøðurnar hjá børnum og starvsfólkum ikki høgt raðfestar! Týdningur av einum dagstovni tykiskt vera, at børnini bara skulu hava eitt stað at vera ansað, meðan foreldrini eru til arbeiðis, so at skattakrónurnar koma í kassan! Dagstovnalógin skal tryggja øllum børnum eitt gott námsfrøðiligt tilboð, sum tekur støði í einum góðum barnalívi.

Tað kann vera, at Landsstýriskvinnan hevur ætlanir á dagstovnaøkinum. Men tíanverri uppliva vit ferð eftir ferð, at aftursvarið frá kommunum er, at "tað eru vit sum gjalda, so tað eru vit, ið skulu valda"! MMR kemur við námsføðiligum stevnumiðum, kommunurnar mótmæla! MMR ynskir at dagføra dagstovnalógina, kommunurnar seta forðingar, so tað tekur eitt ár at manna arbeiðsbólkin. Og soleiðis gongur arbeiðið á økinum. Landsstýriskvinnan hevur ætlanir um at seta eitt námsfrøðingaráð, men fara kommunurnar at fylgja tilmælum frá hesum ráð?

Hvar eru landspolitikarar í hesum? Hugsa teir als ikki um hetta týðandi økið, nú, tað verður fíggjarliga umsitið av kommununum? Eg sakni politiskar visjónir! Eitt dømi er, at økið "børn við serligum tørvi" er lagt út til kommunurnar at umsita. Her verður ikki tikið hædd fyri tørvinum hjá einstaka barninum, men fyri, hvussu nógv stendur játtað á fíggjarætlanini hjá kommununi til børn við serligum tørvi. Í onkrari fíggjarliga trongdari kommunu hava tey eingi børn við serligum tørvi - ella hvør er veruleikin? Og spurningurin um normering á dagstovnaøkinum verður praktiseraður sum best ber til! Politikarar eiga at tryggja børnunum, at rættindi teirra verða vird, m.a. við at tryggja rættar og góðar normeringar í øllum dagstovnum. Eisini er tað skylda politikkarans, at tryggja, at børnini fáa dygdargóð námsfrøðilig tilboð, sum virða ásetingarnar í ST barnarættindasáttmálanum.

Mikukvøldið, 18. mai kl. 19, skipar Føroya Pedagogfelag fyri fundi fyri limum og almenninginum á Hotell Klaksvík, har Karin Jóhanna L. Knudsen, samfelagsfrøðingur á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning, fer at leggja fram áðurnevndu trivnaðarkanning av starvsfólki á dagstovnaøkinum. Vit fara hervið at bjóða bæði lands- og kommunal politikarum at koma á fundin og fáa innlit í viðurskiftini á dagstovnaøkinum. Vit vóna, at áhugin er stórur hjá politikarum at møta, soleiðis at upplivingin hjá pedagogunum sambært kanningini ikki verður tann sama framyvir.